Innkalling til hoyring - Trivnaðarnevnd Løgtingsins
20. oktober kl. 9.30

Hoyringin snýr seg um eina røð av lógaruppskotum, ið allar so ella so hava ávirkan á viðurskiftini hjá fólki, ið bera brek ella eru sjúk.

Fyrst av øllum vilja vit átala staðiliga, at lógaruppskotini ikki hava verið sent til hoyringar, og at ásetingarnar í ST sáttmálanum um rættindi teirra, ið bera brek, í fleiri førum ikki verða fylgdar. ST-sáttmálin staðfestur at tey, ið bera brek, eiga at verða tikin við uppá ráð - serliga tá tað snýr seg um lógir, sum hava stóra ávirkan á teirra viðurskifti. Harafturat eru fleiri viðurskifti í lógaruppskotunum, ið stríða ímóti endamálinum við ST-sáttmálanum, ið er at samfelagið verður innrættað soleiðis, at allir borgarar hava javnsettar møguleikar. Eisini er tað óheppi, at feløgini á brekøkinum verða innkallaði við so stuttari freist.

Heildarmyndin er, at hesi lógaruppskot gera støðuna hjá fólki, ið bera brek ella eru sjúk, verri. Nakrar broytingar raka einsæris, og í nøkrum førum vilja fleiri broytingar raka sama borgara, og hava sera neiliga ávirkan á hansara støðu.

Niðanfyri eru okkara viðmerkingar til einstøku lógaruppskotini:

31/2020 Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk)

Lógaruppskotið er eitt afturstig, í mun til verandi lóg, og vit halda ikki, at lógaruppskotið eigur at verða samtykt. Uppskotið stuðlar ikki undir, at fólk sum bera brek ella eru sjúk kunnu luttaka á arbeiðsmarknaðinum undir somu treytum sum onnur, við tillagingum. Uppskotið hevur við sær, at fólk, sum bera brek fáa stóran lønarniðurskurð, og verða verri stillaði enn onnur.

Lógin, soleiðis sum hon virkar nú, eggjar fólki, sum eru sjúk ella bera brek, at brúka sínar førleikar úti á vanliga arbeiðsmarknaðinum. Hetta er ein gongd, ið Javni fegnast um, og sum bæði hevur persónligar og samfelagsligar batar við sær.

Áðrenn lógin fór at virka var vanligt, at ung við menningartarni og líknandi avbjóðingum blivu fyritíðarpensionistar tá tey blivu 18. Nú fer man heldur undir eina tilgongd at menna arbeiðsførleikarnar (td serliga skipa miðnám), og ofta koma hesi fólkini út í eitt tillagað starv. Dømi eru eisini uppá, at tey koma í vanligt læruplass eftir loknan skúla.

Her kann eg nevna, at í 2020 blivu 20 næmingar við avbjóðingum lidnir á serliga skipaðum miðnámi. Av teimum vóru 12 í arbeiðsbúgvingarskipanini. Átta av teimum eru nú í arbeiðsroynd, ið skal føra til tillaga starv, og tvey eru arbeiðssøkjandi. Tey, ið longu vóru fyritíðarpensionistar hava ikki sama møguleika á arbeiðsmarknaðinum. Av teimum 7 sum vórðu liðug í summar eru trý farin á vart verkstað, og trý arbeiða nakrar tímar á vanliga arbeiðsmarknaðinum við avtalaðari løn (fylgir ikki sáttmálaløn). Sambært lógini kunnu fyritíðarpensionistar ikki arbeiða meira enn 15 tímar um vikuna. Hini fimm eru í øðrum fyriskipanum hjá Almannaverkinum.

Vit eiga at stuðla undir, at fólk við avbjóðingum kunnu vera á arbeiðsmarknaðinum, á jøvnum føti við onnur, men við hóskandi tillagingum. Hetta til gagns bæði fyri viðkomandi arbeiðstakara, og fyri samfelagið.

Okkara málbólkur liggur nokk í flestu førum lægst á lønarskalaðinum, og við hægsta lønarískoyti. Eins og hjá øllum øðrum bólkum fara tey at fáa lutvíst stóran lønarniðurskurð, um lógin verður broytt sum skotið upp. Um sáttmálaløn er 25.000 og arbeiðsføri 10% fær viðkomandi kr. 3.648 kr minni, og tað ger stóran mun fyri at fáa endarnar at røkka saman, tá talan er um

láginntøku. Vit síggja eisini, at lægsti lønarbølkur, við lægsta arbeiðsføri, fer at fáa eina løn, ið liggur undir minstuløn hjá arbeiðarafeløgunum.

Dømi um persón í tillagaðum starvi, við sáttmálaløn á 25.000 og 10% arbeiðsføri:

	Verandi skipan	**Lógaruppskot**	
		Í vardum starvi innan 1. jan 2021	Í vart starv eftir 1. jan 2021
Løn frá arbeiðsgevara 10%	2.500	2.500	2.500
Lønaríkoyti	22.000	19.900	18.552
40 % av (2.500-2.000)			-200
Mánaðarløn	**24.500**	**22.400**	**20.852**

Av hesum verður goldin skattur og arbeiðsmarknaðargjøld.

Samgongan vísir á, at útreiðslurnar til arbeiðsfremjandi tiltøk mugu tálmast, tí tær eru vaksnar ov nógv. Hetta má síggjast í mun til, at útreiðslurnar til fyritíðarpensiónir annars høvdu verið hægri.

Uppskotið er ikki í samsvari við ST sáttmálanum um rættindi teirra, ið bera brek, sum vit hava bundið okkum til at fylgja. Grein 27 snýr seg um arbeiði og starvssetan.

Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um dagpening vegna sjúku v.m. (arbeiðsgevaraparturin longdur)

Uppskotið kann føra til at arbeiðsgevarar ikki so fegnir seta fólk í starv, sum hava brek ella sjúku, ið kann væntast at gera at tey noyðast at verða burtur frá arbeiði oftari enn vanligt. Uppskotið stuðlar ikki undir at gera

arbeiðsmarknaðurin meira atkomuligan fyri tey, ið eru skerd av breki ella sjúku.

Uppskot til broyting í løgtingslóg um almannapensiónir o.a. (Lestrarstuðul frádrigin í fyritíðarpensión)

Onga viðmerking

Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um javningarprosent til almannaveitingar (útsetan av javning)

Tað er sera óheppi um veitingar ikki verða javnaðar frá 2022, sum ætlanin var, soleiðis at veitingarnar fylgja prís- og lønarvøkstri í samfelagnum annars.

Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um almenna heilsutrygd

Sum heild halda vit tað vera óheppi, at fólk sum eru sjúk, skulu fáa meiri útreiðslur av neyðugum heiligvági og hjálparráðum. Hetta kemur at raka lágløn arbólkar harðari enn onnur, og kann fáa álvarsligar fylgjur, um fólk ikki hava ráð til heilivág. Lógaruppskotið hevur tveir stigar, har fyritíðarpensionistar og pensionistar hava eitt lægri egingjald. Vit sakna td at fólk í arbeiðsbúgving, lesandi, og annars allir aðrir lágløn arbólkar eisini eru fevnd av lægra stiganum.

Ætlanin at seta eina hjálparráðsnevnd at taka støðu til umsóknir – vit sakna at kostnaðurin av eini slíkari nevnd er útgreina, og hildin upp ímóti ætlaða niðurskurðinum í hjálpini til borgaran.

Vegna Javna
Fía Petersen, forkvinna